# EM við litum og lívi

**Í hesum døgum stríðast 16 tær fremstu fótbóltstjóðirnar í Europa um europeiska meistaraheitið. Á áskoðaraplássunum er lív í, og fjeppararnir gera nógv burtur úr fyri at stuðla sínum landi. Her eru nøkur dømi um tað**

**Myndir: Polfoto**



*Hesin turkiski áskoðarin hevur rættiliga gjørt seg út til EM*




*Vit eru meistarar. Kanska fær hendan kroatiska kvinnan rætt*



*Hesin italski drongurin er í ringum hýri, ti tað gongur einki serligt hjá italska landsliðnum*



*Hesin heldur sermerkti áskoðarin stuðlar Ruslandi*



*Fagnaðurin var stórur millum turkisku áskoðararnar, tá landið spældi seg víðari frá bólkaspælinum*




*Pólsku kvinnurnar fylgja eisini sínum landsmonnum á vøllinum til EM*



*Hendan turkiska kvinnan roynir at stuðla sínum spælarum, hóast tað ikki stóð nakað til hesa løtuna í dystinum ímóti Kekkia*